# Lærarar rýmdir av Handilsskúlanum

**Lærararnir á datamatikaraútbúgvingini hjá Føroya Handilsskúla í Havn hava sagt upp, tí teir eru so misnøgdir arbeiðsumstøðurnar og leiðsluna á skúlanum. – Tað er ógjørligt at samstarva við leiðsluna, sigur Jon Jonsen, sum er annar av lærarunum. Nú standa 11 næmingar uttan lærarar, men leiðslan fer í dag at leggja uppskot fyri næmingarnar um, hvussu restin av undirvísingini skal skipast**

STRÍÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Lærararnir hjá teimum 11 næmingunum, sum lesa til datamatikara á Føroya Handilsskúla í Havn, havt sagt seg úr starvinum, tí teir halda, at umstøðurnar á skúlanum eru blivnar so vánaligar, at undirvísingin er óforsvarlig*

Teir báðir lærararnir, sum undirvísa datamatikarum á Føroya Handilsskúla í Havn, eru rýmdir úr starvinum. Orsøkin er, at teir halda seg hava vánaligar arbeiðsumstøður, og teir eru sera misnøgdir við leiðsluna á skúlanum.

– Vit eru komin so langt, at vit ikki kunnu standa inni fyri undirvísingini longur. Undirvísingin er ikki forsvarlig, og tá ið vit ikki klára at samskifta við leiðsluna um teir mongu trupulleikarnar, hava vit sagt upp, sigur Jon Jonsen, sum er annar av lærarunum, sum er farin av skúlanum.

Hann er dani og kom í 1998 til Føroya at standa fyri útbúgvingini av datamatikarum.

– Tað eru so nógv smáting sum gera, at umstøðurnar eru vánaligar, og viðferðin, sum vit hava fingið frá leiðsluni, er undir alt lágmark, sigur Jon Jonsen.

### Óforsvarligt

Síðani 1998 eru tríggir flokkar farnir ígjøgnum útbúgvingina sum datamatikarar á Føroya Handilsskúla, og 66 fólk hava fingið prógv.

Nú hevur tann fjórði flokkurin eitt hálvt ár eftir av útbúgvingini, men teir 11 næmingarnir í flokkinum eru nú komnir í trupulleikar orsaka av stríðnum millum leiðsluna og lærararnar.

– Tann nýggja leiðslan á Handilsskúlanum hevur skúgvað alt hjá tí gomlu leiðsluni til viks, og tann vitan, sum varð bygd upp yvir fleiri ár, er burtur. Útbúgvingin eigur at verða rætta móti vinnuni og vera málrættað, men umstøðurnar eru heilt einfalt ikki til at hava eina forsvarliga útbúgving, sigur Jon Jonsen.

Jon Jonsen sigur, at ein høvuðsorsøk til avgerðina at gevast er, at samskiftið millum lærarar og leiðsluna er so vánaligt, og tí ber ikki til at betra útbúgvingina.

### Samskifti í lagi

Stjórin á Føroya Handilsskúla í Havn afturvísir pástandin um, at leiðslan ikki hevur havt nóg gott samskifti við lærararnar.

– Vit hava tosa nógv við lærararnar, tey hava fingið allar neyðugar fundir, og vit hava hjálpt teimum við at betra umstøðurnar, so hasum afturvísi eg púrasta, sigur Raidar Nónfjall.

– Eg havi ilt við at skilja, at lærararnir hava tikið eina so ógvusliga avgerð, men eg kann ikki forða teimum í at gera tað. Soleiðis er á einum hvørjum arbeiðsplássi, um tú ikki ert nøgdur, so mást tú gera eitt val. Men hetta er sera óheppið fyri næmingarnar, sigur stjórin.

Hann fer í dag at leggja eina ætlan fyri teir 11 strandaðu næmingarnar í datamatikaraflokkinum, sum ger tað gjørligt hjá teimum at gera seinasta hálva árið av útbúgvingini liðugt.

– Vit hava arbeitt við at betra um umstøðurnar hjá datamatikarunum, og tað gera vit framhaldandi saman við eitt nú Mentamálaráðnum. Vit kundu øll ynskt okkum tað reina paradís rundan um okkum, men soleiðis er lívið ikki, og bæði leiðsla og lærarar eiga at loysa trupulleikar, heldur enn at skapa teir, sigur Raidar Nónfjall.

# DanCopter fekk noktandi svar um flúgving í Føroyum

**Danska ferðslumálaráðið vil ikki geva DanCopter loyvi at flúgva í Føroyum, tí DanCopter hevur einki føroyskt felag. Tað er DanCopter nú í holt við at broyta og fer at søkja av nýggjum**

TYRLUFLÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

DanCopter vil sleppa upp í offshore flúgving í Føroyum næsta ár, og tí søkti felagið herfyri danska Ferðslumálaráðið um loyvi at flúgva í Føroyum.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar, og DanCopter hevur nú fingið svarið.

– Vit fingu noktandi svar við teirri grundgeving, at vit einki føroyskt felag hava, og tí kundu vit ikki sleppa at flúgva í Føroyum, sigur Susanne H. Lastein, stjóri í DanCopter.

Tyrlufelagið í Esbjerg gevur tó ikki upp av hesari orsøk, tí tey eru longu í holt við at stovna eitt felag í Føroyum, so tey kunnu søkja um loyvi av nýggjum.

– Vit rokna við, at føroyska felagið hjá okkum verður stovnað í dag ella í morgin, og so kunnu vit senda umsóknina avstað av nýggjum, segði Susanne H. Lastein fyrrapartin hósdagin.



### Passa væl til Føroyar

DanCopter hevur tríggjar tyrlur, og felagið flýgur nógv offshore í Norðsjónum, men felagið hevur eisini aðrar uppgávur.

– Vit vilja gjarna sleppa við í føroyska offshore flúgving, sum verður í 2006, og vit hava bæði tyrlur og flogskiparar, sum eru væl egnaðir til flúgving í Føroyum, sigur Susanne H. Lastein.

– Vit vita væl, at umstøðurnar at flúgva í Føroyum er serligar, men vit hava flogskiparar, sum áður hava flogið í Føroyum, og teir hava tann neyðuga kunnleikan til lokalu viðurskiftini, sigur hon.

DanCopter hevur góðar vónir um at fáa loyvi at flúgva í Føroyum, eftir at eitt føroyskt felag er stovnað.

## Signhild setir stevnuna

Tað verður nýggi býráðslimurin í Klaksvíkar býráði, Signhild V. Johannesen, sum fer at seta Norðoyastevnuna í ár.

Upprunaliga stóð í skránni, at Gunvá við Keldu skuldi seta stevnuna, men hetta er nú rættað til, at Signhild V. Johannesen, sum umboðar Javnaðarflokkin í býráðnum, skal seta stevnuna. Hon er úr Klaksvík, men býr á Trøllanesi, sum er blivið partur av Klaksvíkar kommunu.

Setanin av Norðoyastevnuni verður í Vágstúni fríggjakvøldið kl. 19.30. Í sambandi við setanina spælir Klaksvíkar Hornorkestur.

## Kórsangur á morgni

Fyrrapartin Norðoyastevnudag fer kórsangur at ljóma í Vágstúni. Tað er sangkórið í Betesda, sum fer at syngja har frá kl. 10.00 sunnumorgunin. Kl. 11.00 er gudstænasta í Christianskirkjuni, har Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, fer at prædika.

## Nógv náttartilboð

Norðoyastevnan er ikki bara ítróttur, tivoli og framsýningar, stevnan inniheldur eisini nógv náttarlív, og fleiri tilboð eru til tey, sum ikki ætla sær tíðliga undir fjaðrarnar.

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fer føroyski/danski bólkurin Vest & Blues at spæla til gamlamannadans í KÍ-høllini. Hallur Joensen úr Klaksvík er sangari í bólkinum, og teir spældu eisini til dans á seinastu Norðoyastevnu.

Barok skipar fyri diskoteki øll kvøldini á Norðoyastevnu – frá fríggjakvøldi til sunnukvøld – og harafturat hevur eisini Klaksvíkar Klubbi opið á Norðoyastevnu.

Tað ber eisini til at fara í ungdómsdans í einum telti, sum verður sett upp á parkeringsplássinum við KÍ-høllina. Har fara plátuvendarar at standa fyri undirhaldinum.

Føroyskur dansur verður eisini á skránni, og hann verður í Skálanum leygarkvøldið.